# 40 NÝGGJ ARBEIÐSPLÁSS

**FUGLAFJØRÐUR** - Málið er at virka 3.000 tons av laksi til portiónir um árið, og hetta fer ætlandi at geva arbeiði til út við 40 fólk, tá framleiðslan er komin í gongd, sigur Jákup Eli Thomsen

Vilmund Jacobsen

Í morgun eru maskinurnar á laksavirkinum í Fuglafirði royndarkoyrdar, og um nakrar dagar er væntandi, at veruliga framleiðslan á virkinum er komin í gongd.

Faroe Seafood hevur áður havt laksaframleiðslu í Fuglafirði, men nú er rúm tíð síðan, at virksemið helt uppat, og arbeiðsfólkið varð sagt úr starvi.

Men nú verður so roynt av nýggjum í Fuglafirði.

**Salm Pro**

Faroe Seafood hevur selt 2/3 av felagnum, sum áður rak virksemið í Fuglafirði, til ávikavist Viking Seafood á Strondum og Faroe Farming í Suðuroy.

Eigarviðurskiftini í Salm Pro eru soleiðis tríbýtt, har nevndu trý feløg eiga ein triðing í part.

Tað er Jákup Eli Thomsen, sum hevur verið virkisleiðari hjá Faroe Seafood í Vestmanna, ið nú tekur sær av at fáa gongd á komandi virksemi á laksavirkinum í Fuglafirði.

Hann sigur, at tað er gamla felagið, sum nú undir nýggjum navni og við broyttum eigaraskara, fer til verka í Fuglafirði.

**»... tað er gamla felagið, sum nú undir nýggjum navni og við broyttum eigaraskara, fer til verka í Fuglafirði...**




*Virkið í Fuglafirði, sum nú kallast Salm Pro. Út við 40 fólk fáa arbeiði á virkinum, tá framleiðslan av laksaportiónum er komin í gongd. Ætlanin er at virka 3.000 tons av rávøru um árið*

*Mynd: Pætur Joensen*

**40 fólk**

Jákup Eli Thomsen vísir á, at maskinurnar verða royndarkoyrdar í morgun, og sum dagarnir ganga, væntar hann, at rættilig gongd fer at koma á framleiðsluna í Fuglafirði.

- Vit miðja eftir at virka eini 3.000 tons av laksi til portiónir um árið, og hetta skuldi givið regluligt arbeiði til út við 40 fólk, sigur hann.

Jákup Eli Thomsen sigur, at meginparturin av laksinum, sum tey fara at virka til portiónir í Fuglafiðri, fer at koma frá kryvjivirkinum Viking Seafood á Strondum.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Vesturvón við stórari last av kongafiski

**FISKIVINNA** Verksmiðjutrolarin Vesturvón kom fyrrapartin leygardagin aftur av túri úr Irmingarhavinum við góðari last av kongafiski

Vilmund Jacobsen

Leygarmorgunin um 11-tíðina legði verksmiðjutrolarin Vesturvón til bryggju í Fuglafirði við 660 tonsum av kongafiski, sum teir hava fiskað í Irmingarhavinum.

Skip og manning hava hendan túrin verið burtur í 50 dagar.

Veiðan verður nú løgd upp í Fuglafirði, og skjótt verður loyst aftur til nýggjan túr.

Eyðun á Bergi hevur verið skipari hendan túrin í Irmingarhavinum, men á komandi túri verður Erland Olsen á brúnni.

*vilmund@sosialurin.fo*




*Hetta hevur verið eitt gott ár hjá verksmiðjutrolarunum, sum fyrr í ár hava gjørt góðar túrar í Barentshavinum – og nú hava verið á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum*

*Mynd: Dávur Winther*